# Reglur fyri veitingar í sambandi við óvinnuføri

## Ásetingar í sambandi við útgjald vegna óvinnuføri

- Sambært tryggingartreytunum tekur tryggingin við, tá arbeiðsorkan hevur verið skerd við 2/3 ella meira í meir enn tríggjar mánaðir.
- Útgoldið verður so leingi óvinnuføri stendur við, og móttakarin er á lívi, tó í mesta lagi fram til at tryggingin gongur út.
- Veitingin er treytað av, at óvinnuførið er íkomið í tryggingarskeiðnum.

## Fráboðan í sambandi við óvinnuføri

- Í sambandi við óvinnuføri verður skriftlig áheitan um útgjald saman við læknaváttan send til LÍV.  Umsóknarbløðini í sambandi við útgjald og læknaváttan fáast frá LÍV.
- LÍV savnar síðani neyðugar heilsuupplýsingar, og tekur støðu til, um treytirnar viðvíkjandi útgjaldi eru loknar.
- Fráboðanarfreistin er 6 mánaðir frá tí degi, at óvinnuførið er staðfest. Verður boðað frá eftir hesa freist, verður endurgjaldið veitt frá fráboðanardegnum.

## Framhaldandi útgjald

- Rætturin til útgjald er treytaður av, at arbeiðsorkan framhaldandi er skerd við 2/3 ella meira.
- Í fyrsta umfarið verður metingin gjørd við atliti at verandi starvi.
- Tá ein tíð er fráliðin, verður nýggj meting gjørd vit atliti at einum og hvørjum starvi.
- LÍV hevur rætt til at eftirkanna arbeiðsorkuna við jøvnum millumbili.
- LÍV rindar læknaváttanir og kanningar, sum biðið hevur verðið um, tá støða skal takast til framhaldandi útgjald.

## Gjaldsundantøka

- Er tryggingin teknað við rætti til gjaldsundantøku, rindar LÍV tryggingargjaldið.
- Gjaldsundantøka verður veitt eftir somu reglum, sum nevndar eru í sambandi við óvinnuføri.

Neyvari ásetingar eru at finna í almennu tryggingartreytunum , sum eru at finna á www.liv.fo

Eru spurningar ella ivamál ert tú vælkomin at koma inn á gólvið, seta teg í samband við okkum á tlf. 31 11 11 ella umvegis teldupost á tryggingarlaeknin@liv.fo.